

*Eisini í Føroyum hava royndarboringar verið eftir jarðhita*

## Áhugi fyri jarðhita

Víða um heimin eru politikarar og onnur hugtikin av, hvussu nógv íslendingar fáa burtur úr hjitanum í jørðini, og hvussu stóran dent teir leggja á at gagnnýta jarðhitan. Nú um dagarnar hevði tann stóra amerikanska sjónvarpstøðin CNN tíðindi um íslendska jarðhitan, og hvussu hann verður gagnnýttur. Í sendingini vóru myndir úr Íslandi, og CNN endurgav íslendska fortsetan, Ólaf Ragnar Grímsson, fyri at hava sagt, at umleið 100 lond kring heimin ganga í fótasporum íslendingia og royna at gagnnýta hitan í jørðini.

# Carron við markið





*Stena Carron er flaggskipið í altjóða boriflotanum, tá ræður um at bora á djúpum og ringum farvatni. Chevron er langtíðaleigað skipið til m.a. at bora við Føroyar næstu árini*

*Mynd Chevron*




*Kortið vísir Rosebankfundið hinumegin markið, har Stena Carron nú borar sína fyrsta brunn. Eisini síggjast øll loyvini, sum Chevron hevur um hesa leið eitt nú eitt loyvi inni á føroyskum øki*

*Kelda Chevron*

útbygging. Sostatt kunnu vit siga, at við komandi boriprogramminum hjá Stena Carron er ein spennandi kós løgd fram móti at útbyggja tvær nýggjar oljukeldur vestan fyri Hetland, skamt frá føroyska markinum.

Og við hesum í huga stendur eisini greitt, at Chevron umhugsar at bora sín fyrsta brunn á føroyska landgrunninum við sama bomriskipi antin í 2009 ella 2010.

Stjórin í Chevron hevur gjørt greitt, at langtíðarleigan av Stena Carron fyrst og fremst fer at fevna um at bora brunnar á Atlantsmótinum, tvs. økjunum vestan fyri Hetland og eystan fyri Føroyar.